# Enn eitt megnartak!

UMMÆLI
*Sunleif Rasmussen*





*Sunnudagin, 21. mars, var árliga várkonsertin hjá Føroya Symfoniorkestur í Norðurlandahúsinum*

*Savnsmynd*

Sunndagin 21. mars kl. 16:00 hevði Føroya Symfoniorkestur árligu várkonsertina í Norðurlandahúsinum.

Tað byrjaði við einum braki. Stórtrumma, Paukir og ein Tam-Tam byrjaðu verkið hjá Aaron Copland »Fanfare for the Common Man«. Umframt slagverk er verkið skrivað fyri messingblásarar. 5 waldhorn á palli í senn, er ein óvanlig sjón her á landið, og vóru 4 av hornleikarunum føroyingar, ella útlendingar, ið starvast sum tónleikalærarar í Føroyum. Serliga var gleðiligt at síggja og hoyra unga hornspælaran Niklas Mouritsen og unga trompetleikaran Heina Andreasen Tað er gott at gávuríkir ungdómar eisini fáa møguleikan at royna seg sum orkesturtónleikarar. Nevnast skal eisini, at ungir leikarar spældu á sello, bratsj, violinir og slagverk.

Sokallaður klassisikur tónleikur er ikki gomul listagrein í USA. Tónleikur úr USA, er í hugaheiminum hjá teimum flestu tann Afro-amerikanski, ið kom við trælunum. Men norðuramerikanarar hava eisini kend »klassisk« tónaskøld. Tey kendastu eru Aaron Copland og Charles Ives. Báðir eru teir sera spennandi og í mun til teirra samtíð sera nýskapandi tónaskøld. Kom at tosa um hesi bæði tónaskøldini við ein av áhoyrarunum, ið er ættað úr USA. Henni dámdi betur Aaron Copland, meðan undirritaði heldur Charles Ives vera meira áhugaverdan. Kundi ynskt at Føroya Symfoniorkestur setti eitt av verkum hansara á skránna í næstum.

Næsta verki á skránni var »6 Rumenskir fólkadansir« eftir ungarska tónaskaldi Bela Bartók. Bartók brúkti nógva tíð og kreftir til at samla og skriva niður fólkaløg úr Ungarn og Rumenia, og nýtti hann hetta beinliðis ella óbeinleiðis í sínum tónleiki. Teir 6 rumensku fólkadansirnar legði Bartók fyrst til rættis fyri klaver, og síðan instrumenteraði hann teir fyri orkestur. Í nøkrum av dansunum hava ymiskir solistar sín leiklut. Tónleikararnir loystu hesa uppgávu væl.

Síðsta verkið áðrenn steðgin var trompetkonsert eftir Armenska tónaskaldi Alexander Arutjunjan. Hann er helst ikki so kendur her um leiðir, men hansara trompetkonsert er sera nógv spæld. Hetta var eisini ein góð konsert. Ikki long, men vælskrivað. Sjálvt um konsertin varð spæld uttan steðg millum satsirnar, var formurin traditionellur. Ein lívligur fyrsti satsur, ein róligur annar satsur og ein lívligur triðji satsur við soloparti áðrenn endan. Solistur var ungi trompetleikarin Ólavur Olsen. Ólavur spælur nógv djasstónleik, men hetta er fyrstu ferð hann stendur á palli sum solistur við symfoniorkestri. Hann kom sum heild, væl frá uppgávuni. Serliga væl kom hann frá øðrum satsi. Spælið í hesum sera vakra satsi, var kensluborið. Valið av cup sordin var sera heppi. Cup sordin ger, at trompetljóðið minnir um obo, og gjørdi hetta at trompetin samljóðaði sera væl við strúkarar og træblásarar.

Verkið aftaná steðgin var áttanda symfoni eftir tjekkiska tónskaldi Antonín Dvorák. Dvorák, ið livdi frá 1841 til 1904, skrivaði symfoniina í 1889. Hon er, sum flestu symfoniir hansara, væl úr hondum greidd. Partitur hansara eru sera greið og vísa, at hann hevur góðan klangsans.

Tað er sum um Dvorák skrivar seg inn í verkið, og tað er ikki bert galdandi fyri hesa symfoniina. Teir seinnu satsirnir eru meira heilir enn teir fyrru. Serliga býtir ein merki í 4. sats. Her nýtur tónaskaldið sama tema sum í fyrsta satsi. Men í 4. satsi er størri hugflog yvir tónleikinum, bæði hvat tematiska arbeiðinum og klangarbeiðinum viðvíkur.

Føroya symfoniorkestur undir leiðslu av Bernhardur Wilkinson kom væl frá uppgávuni. Orkestrið prógvaði at tað megnar at framføra eina stóra romantiska symfoni uttan lítir, og er hetta ikki bara sum at siga tað undir verandi umstøðum.

Tað var nógv størri flog yvir hesari framførsluni enn framførsluni av 5. symfoni eftir Tjajkovskij seinasta heyst. Orkestrið ljoðaði betur, og teir ymsu bólkarnir í orkestrinum vóru javnt góðir hesaferð. Undirritaði helt seg eisini leggja merki til at arbeitt hevur verið við at fáa motivini at stemma.

Á spælinum tykist ein at merkja, at samarbeiðið millum Føroya Symfoniorkestur og Bernhardur Wilkinson er fruktagott. Framgongdin hjá orkestrinum hesar seinastu tvær konsertirnar ber í hvussu er boð um, at so er. Men um orkestrið skal menna seg enn meir skulu tey spæla meir, og hetta kostar pengar.

Í minsta lagið seks konsertir um árið, og um tað skal lata seg gera, skal sjálvandi tað dupulta av peningi til.

Hugsið tykkum um liðini í bestu fótbóltsdeildini bert spældu tríggjar dystir um árið. Neyvan hevði tað verið ein vøkur sjón.





*Føroya Symfoniorkestur prógvaði, at tað megnar at framføra eina stóra romantiska symfoni uttan lítir, og er hetta ikki bara sum at siga tað*

*Savnsmynd*



*Framgondin hjá Føroya Symfoniorkestri ber boð um, at samarbeiðið við Bernhard Wilkinson er fruktagott*

*Savnsmynd*





**Páskamatskrá við 3 rættum fyri einans kr. 195,- (Børn 1/2 prís)**

**Forrættir:**
- Linstokt høsnarungabringa í balsamicolaka við salati
- Hvítleykstoktar kinarækjur við tazikisalati og crouton
- Útágjørd fiskasúpan

**Høvuðsrættir:**
- Búffur av neytasneið við kryddsmøri og grønmeti
- Heilstokt Koltursoksakjøt við soppasauté og sós av soðnum
- Lambssneið við stoktum grønmeti og rósmarinsós
- Hunangslakað grísasteik við grønmeti & estragonsós

Omaná bjóða vit stórt dessertborð.

**Sertilboð íroknað páskadøgurða, gisting & morgunmatarborð**
Dupult kamar, **kr. 495,-**
Einkult kamar, **kr. 670,-**
Prísurin er galdandi pr. persón/pr. nátt í tíðarskeiðnum 8. - 12. apríl.

Bíleggið borð ella gisting á 317500.

Vit skapa góð minni...

GLASSTOVAN
The Favourite Restaurant

petur & petur - 320870






Frá
Frants Restorff

Stongt Skírisdag og Langa fríggjadag
**Leygardagin 10/4: Opið sum vanligt**
Stongt páska- og 2. páskadag
**Týsdagur 13/4: Opið sum vanligt**

Vit ynskja øllum
einar gleðiligar páskir.



## Deildarleiðari til Vinnudeildina á Føroya Tele

"Tað er ikki tí at ting eru trupul, at vit ikki tora. Tað er tí vit ikki tora, at ting eru trupul"
- Seneca -



Fjarskifti og kunningartøkni mennast alsamt skjótari um allan heim, og tann týdningur, sum hetta hevur fyri kappingarførið hjá fyritøkum í Føroyum gerst størri fyri hvønn dag. At kunna fáa rætt, skjótt og gott samband um telefon og internet við kundar heima og uttanlands er ein fortreyt fyri at kunna veita tær tænastur, ið fyritøkur liva av.

Endamálið hjá Vinnudeildini á Føroya Tele er at skapa so góðar fortreytir hjá føroyska vinnulívinum sum gjørligt.

**Málið verður rokkið við**
- altíð at hava nýggjastu útgerð frá leiðandi veitarum á samskiftismarknaðinum.
- at veita kundum okkara viðkomandi ráðgeving um, hvør útgerð er best hóskandi til júst teirra tørv.
- at hava neyðuga førleikan og royndir á deildini.
- at vit samstarva við veitarar innan dátu og el við tí endamáli at veita heildarloysnir.

Føroya Tele er einasti veitari við deildum kring alt landið, og soleiðis er fyritøkan før fyri at nøkta ein og hvønn tørv til tann krevjandi kundan.

**At standa fyri hesum arbeiði verður søkt eftir leiðara, sum skal**
- skapa fast samband við kundarnar fyri at vera dagførd um tørv og nøgdsemi og fyri at menna long og varandi kundasambond gjøgnum álit og virðing.
- tryggja, at Føroya Tele skipað og áhaldandi fær efturmeldingar um kundatørv, soleiðis, at vit kunnu menna nýggja vitan og nýggjar tænastur.
- fylgja væl við marknaðarstøðum, sum kunnu ávirka framtíðar kundatørv við atliti til at kunna melda klárt og beinleiðis um, hvønn tørv Føroya Tele kann nøkta – og ikki nøkta.
- skapa álítandi sambond við kundar og starvsfólk.
- duga væl við fólki og duga at samskipa arbeiði úr ymsum deildum við ymiskum mentanum til gagns fyri kundan

**Útbúgving:**
Ástøðilig útbúgving frá hægri lærustovni sum t.d. cand. merc, cand. oecon, verkfrøðingur, ella líknandi.

Á Vinnudeildini eru 11 starvsfólk, sum eru skipað í tvær deildir við vinnuráðgevum og teknikarum.

Lønin verður eftir avtalu.

Meira fæst at vita um starvið frá Richardi Mortensen, deildarstjóra, á tlf. 303030 ella frá Starvsfólkadeildini.

Umsóknir við avritum av viðmælum og prógvum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 19. apríl 2004 kl. 12.00.

**Føroya Tele**
Starvsfólkadeildin
Box 27
110 Tórshavn

**Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Fjarskiftisøkið mennist sera skjótt, og hetta setur stór krøv til fyritøku og starvsfólk. Vit søkja tí eftir skikkaðum fólki, sum vilja vera við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.**

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*